# ÍSF-forseti í fjórðingsøld

Í farna mánað vóru tað 25 ár síðani, at Heðin Mortensen bleiv valdur til forseta í Ítróttarsambandi Føroya. Hesi 25 árini er nógv hent innan føroyska ítrótt, og Heðin Mortensen dylur ikki fyri, at tað hevur verið bæði ein spennandi og turbulent tíð.


ÍSF forsetin uttan fyri glæsiliga ítróttardepilin á Guernsey á seinastu Oyggjaleikum

ÍSF-FORSETI Í 25 ÁR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað var tann 4. mars í 1980, at Heðin Mortensen avloysti Jógvan Arge sum formann í Ítróttarsambandi Føroya. Undan hesum hevði Heðin í eina tíð verið skrivari í ÍSF. Hetta var ein tíð, har nógv hendi innan føroyskan ítrótt. Beint undan aðalfundinum hjá ÍSF á vári 1980 hevði nevnliga ein tann størsta einstakaítróttarhendingin nakrantíð í Føroyum verið á skránni, tá ið skipað var fyri CHM í manshondbólti.

### Umskipaðu ítróttina

Heðin Mortensen greiðir frá, at eitt tað fyrsta átakið, ið hann saman við øðrum fór undir, var fullkomiliga at broyta lógir og viðtøkur fyri ÍSF. Høvuðsendamálið við lógarbroytingunum var at tillaga ÍSF til tey krøv, ið vóru neyðug, um føroyskur ítróttur skuldi fáa bæði norðurlendska og alheims viðurkenning.

Hetta hevði við sær, at ítróttarsambandið fekk ein heilt annan bygnað, og samstundis var hetta startskotið til, at teir einstøku ítróttargreinarnar fingu síni egnu sersambond.

Tað var bara Fótbóltssamband Føroya, ið var sett á stovn, áðrenn bygnaðarbroytingarnar í ÍSF í 1980. FSF var sett á stovn árið fyri, men tað gekk ikki long tíð, so vóru sersambondini væl fleiri í tali, og í dag eru tey 15.

Teir fimtan formenninir í teimum ymsu sersambondunum manna saman við teimum trimum starvsnevndarlimunum í ÍSF aðalstjórnina í Ítróttarsambandi Føroya.

- Tað var ein munandi lætti fyri leiðsluna í ÍSF, at bygnaðurin bleiv broyttur soleiðis, at øll sersambondini komu. Hetta hevði við sær, at tann fíggjarliga ábyrgdin bleiv býtt út til tey ymsu sersambondini, og hvør ítróttargrein fekk eina starvsnevnd, sum burturav arbeiddi fyri júst hesi ítróttargrein, greiðir Heðin Mortensen frá.

### Vantandi olympiski limaskapurin

Eitt av hjartamálunum hjá Heðin Mortensen hevur eisini verið at fingið Føroyar innlimaðar í altjóða olympiska felagsskapin IOC.

Longu í 1980 var olympiska nevndin sett á stovn, og Heðin Mortensen var sjálvur triði í fyrstu nevndini saman við Niels Juul Arge, ið var formaður og Tórmóði Djurhuus.

- Tá vóru nýggju lógirnar smíðaðar og tillagaðar, soleiðis at vit kundu lúka tey krøv, ið vóru sett til limir í altjóða ítróttarsambondum, so sum IOC. Vit sendu tí eina umsókn um olympiskan limaskap beinan vegin, men enn tann dag í dag hava vit ikki fingið svar upp á hesa umsókn, hóast vit fleiri ferðir hava roynt at fáa eitt endaligt svar, greiðir ÍSF-forsetin frá.

- Hetta er einasti altjóða limaskapurin, ið vit mangla. Fyri mær tykist tað sum um, at IOC ikki vil hava smátjóðir við. Øll hini norðanlondini stuðla okkara umsókn um limaskap í IOC, og vit hava gjørt øll møgulig átøk fyri at fáa IOC at ganga umsóknini á møti uttan úrslit, sigur Heðin Mortensen.

Hann vísir á, at til dømis var herfyri gjørdur ein bóklingur, ið millum annað hevði til endamáls at vísa leiðsluni í IOC, at Føroyar hevði limaskap í øllum møguligum øðrum ítróttarsamgongum, so sum FIFA og EHF. Í bóklinginum boða fleiri kendir persónar og felagsskapir frá, at teir stuðla føroysku umsóknini. Millum teirra, ið bakka upp um føroyska limaskapin í bóklinginum, er danski forsætismálaráðharrin Anders Fogh Rasmussen.

- Tað seinasta trekkið, um eg so má siga, ið IOC hevur gjørt, er, at teir nú seta sum krav, at


*Fimm av forsetunum sum hava verið í ÍSF. Ólavur Lambá, Líggjas Joensen, Erhard Næs, Jógvan Arge og Heðin Mortensen*



*Heðin Mortensen, Bjarni Vilhelm og Niels Nattestad á ÍSF-fundi*